Nr. 136 - 22. juli 2003 Sosialurin 19

# »Tað skal selja«

**Sosialurin fekk eina samrøðu við bassistin og sangaran úr bólkinum Bomfunk MC's, har tosað var um leyst og fast**





G! FESTIVAL

*Rógvi Borðoy*
*og Johan Jacobsen*

–Vit hava fingið ov nógv av øllum, sigur forsangarin B.O.W. ella Raymond Eubanks, sum hann veruliga eitur. Hann hevur júst etið seg um rygg av fiskarættum, sum tónleikararnir hava fingið í boði, og hann er sera væl nøgdur við móttøkuna, hann hevur fingið í Føroyum.

–Vit vóna bara, at veðrið verður gott, tí annars kann tað gerðast ein keðilig konsert hjá okkum, sigur hann.

Raymond Eubanks er føddur á Jamaika. Pápi hansara er haðani, og mamman er úr Finnlandi. Har er hann eisini uppvaksin. Tó hoyrist ein farri av jamaikanskari ávirkan í hansara enska.

Hann sigur seg vera bilsnan av, at tað er so nógvur tónleikur til í Føroyum.

– Tað er ótrúligt at tað skula vera so nógv orkestur í einum so lítlum landi. Og sum eg havi skilt á lagnum, so eru tey eisini góð, sigur hann.

## Mr. Villy

Bassspælarin eitur í veruleikanum Ville Makinen, men brúkar vanliga eyknevnið Mr. Villy. Hann sigur, at teir valdu at koma hendan vegin orsakað av reinu náttúruni.

Tað er so reint her, at eg næstan sakni eitt sindur av dálking, sigur hann og flennir hart. Hann er ein sera fryntligur maður, og hann flennir nógv gjøgnum samrøðuna.

–Vit hava ikki sæð nakað av landinum enn, tí tað er mjørki allastaðni. Men vit vóna, at tað verður gott í morgin, tí vit skulu á útferðir at síggja landið hjá tykkum. Higartil sær tað annars út sum Ný Sæland, burtursæð frá, at tit ikki hava serliga nógv trø.

## 5.000.000 eintøk seld

Bomfunk MC's fingu sítt stóra gjøgnumbrot í 2000, tá teir góvu út stakfløguna »Freestyler«, sum enn er teirra kendasta lag. Teir hava higartil selt 2,2 milliónir eintøk av tí fløguni, og teir selja enn. Um gjøgnumbrotið sigur B.O.W.:

–Tað broytti okkara lív, í hvussu so er eitt sindur. Síðani tað hava vit ferðast um allan jarðarknøttin, og tað eru ikki øll, sum kunna tað. Tað eri eg errin av.

Hóast teir hava selt sera nógvar fløgur, kenna teir seg eitt sindur snýttar. Orsøkin er MP3-marknaðurin, sum teir siga hevur oyðilagt nógv fyri teir.

–Her á skrivstovuni gekk ein maður runt og reypaði av, at hann hevði 30.000 MP3 sangir liggjandi á teldu síni. Eg dugi ikki at síggja, at tað skal vera nakað at reypa av, tí tað ger tað nærum ógjøligt at byrja ein nýggjan bólk. Allir sangirnir, sum ein ger, verða lagdir út á alnótina, og tónleikararnir fáa einki burturúr, sigur hann umhugsið.

B.O.W. heldur fram at tosa um, at tað serliga er í Russlandi, at MP3-marknaðurin ger seg galdandi.

## Tað skal selja

Teir báðir finsku tónleikararnir eru sera áhugaðir í øllum sløgum av tónleiki. Teir nevna, at serstakliga tulkingar av gomlum tónleiki er umráðandi at fáa við, tí tað gevur teimum ungu hug til at læra meir um søguna hjá einstøku tjóðini.

–Í Finlandi eru fólk farin at brúka søguligu og aldargomlu Kallevalla kvæðini til nýskapandi tónleik. Til dømis bólkurin Amorphis ger nógv við tað, og tað er sera gott at finski tónleikaheimurin er áhugaður í at finna sínar egnu røtur. Tað fær søguna nærri at ungdómunum, sigur Mr. Villy.

Mr. Villy hevur hoyrt um ein føroyskan tungmálmsbólk, sum brúkar føroysku kvæðini, og talan er uttan iva um Týr.

–Trupulleikin er, at plátufeløgini vilja hava fløgurnar til at selja, og ikki allur tónleikur er førur fyri at selja nógv. Plátufeløgini satsa bert upp á tryggar íløgur, tað vil siga »hits«og tónleik ið kann fara í MTV.

## Nýtt ljóð

Bomfunk MC's hava verið í studio og tikið upp eina nýggja fløgu. Hon kemur í handlarnar í heyst einaferð, og hon verður nakað øðrvísi enn tað vit higartil kenna frá bólkinum.

– Hendan fløgan hevur eitt nýtt ljóð. Hon er ikki so hip-hop fikserað, men hevur meira »breakbeats« enn vit higartil hava havt. Og so er ikki bara rapp, men eisini vanligur sangur. Og her brúka vit ikki líka nógv sampling, sum vit annars hava gjørt. Her hava vit meir vanlig ljóðføri. Og soleiðis má tað vera: ein nýggj útgáva er eitt nýtt ljóð, sigur Mr. Villy.

Víðari sigur hann, at hesi árini hava verið sera góð fyri tónleik í Skandinavia. Serliga hevur tað gingist væl hjá svenskum og finskum bólkum, men hann roknar við, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn ein danskur bólkur gerst heimskendur.

## Tónleikamentan

B.O.W. sigur, at í Finlandi kenna allir tónlikarar hvønn annan. Finland er eitt lítið land, og tí mugu tónleikararnir taka við læru av hvørjum øðrum. Meðan vit tosa, kemur K-System, ein annar finskur bólkur, inn, og allir byrja beinanvegin at práta á finskum. Teir kenna væl hvønn annan, sæst týðuliga, og hetta er heldur ikki fyrstu ferð, teir spæla konsertir saman.

– Hip-hop mentanin er eitt nýtt mentunarligt íkast til samfelagið. Tað er eitt nýtt slag av bókmentum, sum verður nýtt til at geva nakrar staðfestingar, sum ung fólk hava. Fyrr sungu finsku rappararnir um amerikanskar støður, so sum at sleppa úr ghettoini. Nú hava vit ongar ghettoir í Finlandi, so tað er nokkso býtt at syngja um, siga teir báðir í einum munni.

–Men í dag eru tekstirnir blivnir meir staðkendir og finskir.

## Sandurin bíðar

Um ein tíma fara Mr. Villy og B.O.W. á pallin á Sandinum í Gøtu, og teir eru spentir uppá, hvussu tað fer at ganga. Teir siga, at hetta væl kann gerðast teirra besta framførsla, tí umstøðurnar eru so frálíkar við náttúruni beint við pallin.

Framførslan gjørdist í síðsta enda frálík.

## Fakta um nakrar av bólkunum

Vit hava tíverri ikki fingið tøl frá øllum bólkunum.

| | | |
|---|---|---|
| Glorybox | Pale Blue Lights | 3.500 |
| | Vacuum Album | 7.000 |
| K-System | Come To Me | - |
| | You Gotta Love | - |
| | Set U Free | - |
| | Supadupasound | - |
| | Rok The Discoteque | - |
| | Clubmaster | - |
| | Supadupasounds | - |
| Eivør Pálsdóttir | Soloflogan | 3.500 |
| | Yggdrasil | 2.000 |
| | Clickhaze | 3.500 |
| | Tilsamans | 9.000 |
| Hanus Johansen | Bouquet (við Aldubáruni) | 1.500 |
| Enekk | Ver sterk mín sál | 700 |
| | Andlit hins tigandi | 800 |
| | Fýra nætur fyri Jól | 1.500 |
| | Tilsamans | 3.000 |
| Úlpa | Mea Culpa | - |
| | Nýtt album 01.08.03 | - |
| Spælimenninir | 8 útgávur | 10.000 |
| Xploding Plastix | Treat me mean, I need the reputation | 1.000 (útselt) |
| | Doubletalk | 1.000 (útselt) |
| | Behint The Eightball | 2.500 (útselt) |
| | Amateur girlfriends go proskirt agents | 15.000 |
| | The Benevolent Volume Lurkings | 1.900 |
| | Sunset Spirals (útkomin 14.07.03) | 800 |
| | Duncamatic singalongs (kemur 01.09.03) | |
| | Tilsamans | 22.200 |
| | | + umleið 50 uppsavningsfløgur |
| Bomfunk MC's: | Something going on | |
| | Live your life | |
| | Burnin' Sneakers | |
| | Super Electric | |
| | In Stereo | |
| | Freestyler | |
| | Uprocking Beats | |
| | B-Boys & Flygirls | |
| | Teir siga seg hava selt: | 5.000.000 |

# Spæliplássið

Rúnar er múrari og arbeiðir við tónleiki í frítíðini. Men hjarta er har sum tónleikurin er, sigur hann. Ein sera róligur og spakur ungur maður. Hann var 18 ár, tá hann keypti sín fyrsta gittara.

Hann hevur spælt við einum íslendskum bólki, Náttfari, sum spældi instrumentalan tónleik. Nú arbeiðir hann sjálvur og hann dámar tað nógv betri.

–Hetta er meiri hóskandi fyri meg, eg haldi meg hava meiri at arbeiða við – fleiri møguleikar.

At gera tónleik, er tað tað heila snýr seg um, sigur hann. Tónleikur fyri mær er at úttrykkja veruleikan og konfrontera fólk við ymiskum úr gerandisdegnum.

Sum íblástur nevnir hann gerandisdagin og serliga fólk, sum eru tey sjálvi. Eitt tónleikanavn hann nevnir er Jeff Buckley.

–Ótrúligt at ein kann gera eitt rúm fult av fólki so pinnastilt, sum Jeff Buckley kundi gera tað. Her meinar Rúnar við ta einu ferðina, tá nøkur av hansara vinfólkum vóru og lurtaðu eftir hesum stóra tónleikaranum.

– Tað størsta stríðið hjá einum tónleikari, haldi eg, er at vera erligur.

Honum dámar væl stemningin á G! Festivalinum og hann hevur havt tað gott.

–Her er gott at vera, eg eri blivin væl móttikin og ongir trupulleikar hava verið.

Hetta er fyrstu ferð hann er uttanfyri Ísland.